# Skjót boðberan

**BILL JUSTINUSSEN**
Løgtingsmaður



Í gomlum døgum var tað ikki so hugaligt at vera tann, sum kom við vánaligum tíðindum til kongar og keisarar. Tí boðberin gjørdist meira enn so høvdið styttri, tá ringu tíðindini vórðu borin fram fyri tátíðarinnar mætu monnum. Ikki sørt, at ein situr við líknandi kenslu, eftir at høvuðsinnihaldið í einum skrivligum fyrispurningi til landsstýrismannin í heilsumálum varð latið fjølmiðlunum fyri góðari viku síðani. Bæði landsstýrismaðurin og læknastjórin halda, at framferðin er ófantalig, meðan læknarnar á Landssjúkrahúsinum í almennum brævi til mín tváa sínar hendur og geva politisku skipanini alla skyldina av syndarligu støðuni, tí grundin til alt ilt er vantandi játtan til Landssjúkrahúsið. Eisini hóttir landsstýrismaðurin við, at undirritaði má bera fram óreingiligt prógv fyri mínum útsøgnum, tí annars má málið fáa avleiðingar fyri meg. Hvørjar?? Samanlagt tykist hetta mær alt ódámligt, tí tað sær ikki út til, at ábyrgdarpersónar hava veruligan vilja til at taka í egnan barm fyri at fáa skútuna aftur á beint. Tá eg loyvi mær at seta fram hvassorðaðan fyrispurning um viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum, so er hetta sjálvandi ikki tikið úr leysum lofti. Í longri tíð havi eg umhugsað støðuna, og tá ið tað støðugt og framhaldandi verður borðreitt við einari keðiligari søgu fyri og aðrari eftir, kann eg ikki longur tiga. Tað er mín skylda sum fólkavaldur politikkari at tala at, tá borgarin ikki fær ta tænastu, sum er hansara rættur og krav. Øll kunnu í ein avmarkaðan mun góðtaka, at menniskjalig mistøk henda á Landssjúkrahúsinum. Men tá ein fær sterkar ábendingar um, at talan ikki er um undantøk, men heldur um afturvendandi mistøk, er neyðugt at steðga á og kanna viðurskiftini. Og tað fer landsstýrismaðurin vónandi at gera, um Løgtingið loyvir honum at svara mínum fyrispurningum. Og vónandi fara hansara kanningar at finna fram til teir týðandi veikleikar í skipanini, sum eru orsøk til tær mangan sváru mannalagnur, sum ofta eru úrslitið av vantandi ella skeivari viðgerð og viðferð.

Mítt endamál er, at Landssjúkrahúsið, sum er ímyndin av føroysku vælferðarskipanini, kann lyftast upp á eitt støði, har øll, sum koma til viðgerð, fáa ta hjálp, sum yvirhøvur er tøk innan sjúkraviðgerð. Alt tos um, at álitið á Landssjúkrahúsið er fokið, tí ein fyrispurningur kemur til landsstýrismannin, er uttanumtos. Landssjúkrahúsið er ikki eitt korthús, sum raplar fyri minsta lotinum, men ein sterkur stovnur, har hægst útbúnu fólkini í landinum starvast. Tí seta vit sjálvsagt hægstu krøv til stovnin.

Tíðindini alla seinastu viku vísa, at neyðugt er at varpa ljós á viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum. Eg fari ikki her at viðgera málið í smálutum, tí tann viðgerðin verður vónandi á Løgtingi. Men fyri at gera eina samanfataða viðmerking til orðaskiftið í fjølmiðlunum skal eg bert heita á landsstýris-mannin, læknastjóran og læknarnar um at taka fyrispurningin og atfinningarnar positivt til viðgerðar. Tað nyttar ikki hjá nøkrum at renna undan ábyrgdini, tí hon fær okkum altíð aftur. Um orkan verður nýtt til at jarða tað, sum undirritaði og onnur hava borið fram, so skal nógv orka nýtast. Nýtið heldur orkuna til at gera upp við teir trupulleikar, sum øll vita, eru til staðar.

# Opinleiki og gjøgnumskygni í Sands kommunu Orrustan í klandurskotið

**LEIF W. K. MORTENSEN,**
Sandi

Eftur at hava lisið álitið frá Løgtingsins umboðsmannið viðvíkjandi klæðuni frá Starvsmannafelagnum um Sands kommunu, eru tað ávísting í álitinum, ið eg havi viðmerkingar til. Tað fyrsta er aftursvarið frá Sands kommunu til løgtingsins umboðsmann um klæðuna frá Starvsmannafelagnum. Sands kommuna, t. v. s. meirlutin í bygdaráðnum, roynir í tí fyrsta aftursvarinum at skúla løgtingsins umboðsmann við millum annað at biða hann leggja málið frá sær. Hetta skriv kemur beint aftur í høvdið á bygdaráðnum. Tað sum síðan verður sent løgtingsins umboðsmanni er undir alt lágmark. Tað bræv, ið kommunan sendir Løgtingsins umboðsmannið, er so grovt, at eg ivist stórliga í at meirlutin í kommunustýrinum er greiður yvir, hvat stendur í hesum skrivi. Ein kann spæla sær við tankan, at borgarstjórin hevur leitt bygdaráðið bak ljósið, ella tað sum enn verri er, Løgtingsins umboðsmann, hetta er tó bara ein tanki.

Tað fyrsta, ið ein leggur til merkis í hesum skrivi er, at tað er skrivað út frá einum persóni, og tað er borgarstjóranum sjálvum. Men trupulleikin er tann, at hetta enn er tað sama svar Løgtingsins umboðsmaður bíðar eftir, tí skilur undirritaði hetta sum svar frá meirlutanum í bygdaráðnum. Í hesum skrivi verður skrivarin lagdur undir stuldur, skjala falsan og mangt annað tílíkt. Um bygdaráðið er vitandi um tílík lógarbrot, er tað teirra ábyrgd mótvegis skattgjaldarunum at hetta fær fylgir.

Bygdaráðið fer so langt sum at siga onki skil hava verið á nøkrum kommunustýri undan teimum heilt aftur í 80'ini. Tílík uppáhald eiga ikki at sleppa at standa óátalað.

Løgtingsins umboðsmaður heldur ikki hann kann taka dagar millum, hvør chikanerar hvønn og dugir ikki at síggja, at tað eru politisk motivir, ið eru orsøkin til uppsøgnina. Tó kann ein í álitinum fáa dokumenterað, at borgarstjórin hevur kallað skrivaran til fundar, nú teir hon stulaði politiskt eru falnir. Hetta er beint eftir seinasta kommunuval. Um hetta ikki undirbyggir páhaldni um chikanu, ja so veit hesin ikki.

Borgarstjórin er so frekur, at hann í sínum sjálvsrósi hásetur seg sjálvan, tí hann hevði sett seg í samband við læknarnar í oynni og biðið um at fáa skrivararn upp í tíð. Dugir hann ikki í síni fávisku at síggja, hvussu stóran skaða hann kundi gjørt skrivaranum við yvurhøvur at seta seg ísamband við aðrar arbeiðsgevarar hjá skrivaranum. Og hvat hann hevur sagt um skrivaran, ja tað kunnu vit bara gita um, tí sambært aftursvarinum til Løgtingsins umboðsmann, hevur borgarstjórin onki gott at bera skrivaranum.

Lítið er at ivast í, at hetta sirkus hevur kostað kommunukassanum nógvar krónur. Og eftir sita vit skattgjaldarar og spyrja, hvat vit hava fingið burturúr. At føra eitt “stríð” móti einum ávísum borgara ætli ikki at vera ábyrgdin hjá einum kommunustýri, og als ikki ein byrða hjá kommunukasssanum.

Stóð tað upp til mín, skuldu hesir bygdaráðslimir sjálvir sloppið at goldið gildið. At eingin yvirhøvur reagerar upp á hetta málið, er tað sum eg havi torførst við at skilja. Eingin myndugleiki yvurhøvur hevur blandað seg upp í hetta mál, uttan tá teir eru bidnir. Alt ov fáir borgarar hava givið sína meining til kennar í hesum máli, líka mikið hvønn veg teir hella. Tað er kanska torført hjá okkum meinigu at fáa innlit í, hvat er gingið fyri seg, og í mínari verð er kommunan og alt har umkring eitt lukkað land. Eitt gott dømi er tann nýggja og stásiliga heimasíðan hjá Sands kommunu. Ikki eitt orð stendur har um, at kommunan hevur fingið tvær átalur frá landsins hægsta myndugleika, tó kann man lesa á síðuni um opinleika og gjøgnumskygni. Luktar alt ov langt av enn einum propaganda amboð hjá kommununi. Hevði verið eitt hugskot at lagt fíggjarárið 2005 inn á heimasíðuna, so ein kundi sæð, hvat alt hetta hevur kostað kommunukassanum. Mær vitandi eru fíggjarárið 2005 og fíggjarætlan 2006 ongantíð blivnar lýstar at liggja frammi á kommunuskrivstovuni sum gamalt var. Men sum við so nógvum øðrum hjá hesum kommunustýri, meta teir helst, at tíðin er farin frá at upplýsa, hvat pengar borgarans verða nýttir til. Prátaði við lógarkønan mann nú ein av døgunum, og vísti hann mær á, hvussu álvarslig henda líkasæla var, ið hann sum áskoðari hevði lagt tilmerkis. Tí at hava eina meining og tora at siga hana, er ein av hornasteinunum í einum og hvørjum demokratiskum samfelag. Eg fari at enda at heita á allar borgarar og ikki minst kommunustýrislimir, um at fara inn á heimasíðu Løgtingsins umboðsmann, og lesa álitið. Tó fari eg at ávara um vandan við at lesa álitið alt ov seint á kvøldi, tí møguleiki er fyri at ein ikki svevur á nátt.

**STUTT SAGT**

# Søtsuppa ella bótasuppa?

**JÁKUP VANG**



Ein Guðs maður segði einaferð at honum dámdi ikki at ræða fólk. Honum líkaði betur at tosa um kærleika.

Er hesin maður í tráð við Bíbliuna?

Bíblian er kærleiksboðskapurin frá Guði. Men – hon talar sanniliga eisini álvarsamt, ræðandi og ávarandi. Hvat nú?

Er tað skeivt at ávara menniskju, at ein avgrund er fyri framman, og at best er at venda við?

Hetta er kærleikin frá Guði, Jesus doyði ein ræðuligan deyða. Hann doyði í staðin fyri okkum.

Vilt tú ikki taka ímóti hesum Staðgangara tínum, so mást tú doyggja brádliga.

Í Lukas kap. 13 stendur, at eitt torn í Siloa rapaði og drap 18 mans. Jesus segði ikki, at teir vóru syndarar framum onnur. Nei – hann svaraði teimum »Eg sigi tykkum, men venda tit ikki við, skulu tit allir ganga til grundar á sama hátt«.

Kæra menniskja, alt hetta er sagt í kærleika. Vakna og vend við og tak við trúgv á Jesus.

Tað stendur víðari í Lukas 13 v. 23 og 24., ein segði við Hann (Jesus): »Harri, munnu tað vera fá, sum vera frelst«? Tá segði hann við tey: »Stríðist fyri at koma inn um hitt tronga portrið. Tí mong, sigi eg tykkum, skulu royna at koma inn og ikki kunna«. T.v.s. formáa tað.

Tað dugir ikki, at pakka tað inn.

Tað er tveir Harrar, Guð ella Djevulin. Valið er títt.

# Stór NÓSA-tiltøk um alt landið

**So hevur NÓSI aftur føðingardag, og tey, sum tøma NÓSA í Føroya Banka, fáa atgongumerki til spennandi føðingardagin**

**NÓSI**
*Tíðindaskriv frá Føroya Banka*




Føðingardagurin verður hildin kring landið í stórum ítróttarhallum, og nógv spennandi verður á skránni. NÓSI heldur føðingardag á hesum støðum kl. 15.00:

*Leygardagin 9. sept. í Kíhøllini*
*Sunnudagin 10 sept. í høllini í Runavík*
*Leygardagin 16. sept. í høllini í Vestmanna*
*Sunnudagin 17. sept. í høllini á Giljanesi*
*Leygardagin 23. sept. í høllini á Hálsi*
*Sunnudagin 24. sept. í høllini í Trongisvági*

Føðingardagurin byrjar við, at hoppiborgarnir verða tendraðar. Angela bjóðar síðan vælkomin, og Meyla og Knøttur fara at undirhalda.

NÓSI og tveir landsliðsleikarar verða við á pallinum, og børnini fara at kunna skjóta upp á mál, meðan ein landsliðsmálmaður roynir at verja.

Børnini fáa eisini okkurt spennandi at eta og drekka, og skipað verður fyri teknikapping. Ballónir verða eisini at fáa. NÓSI gleðir seg til at síggja nógv fólk í føðingardegi.